# Finn fekk sekkin

Fyrstu ferð Finn Nørbygaard var í Føroyum, var hann tikin av plakatini, tí eingin tímdi at lurta eftir honum. 20 ár seinni var hann aftur í Føroyum, og nú var sum vent í holuni



– Tí er tað eitt satt spæl at fara á pallin til eitt slíkt tiltak sum her í Klaksvík. Her kann eg vera púra fríur og gera tað, sum eg havi hug til, sigur Finn Nørbygaard

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SKEMTARI
*Eyðun Klakstein*

Skemtarar sum Finn Nørbygaard eru vanir við at gera eitt show, sum skal spælast umaftur og umaftur. Somu søgurnar skulu sigast kvøld eftir kvøld, meðan nýggj fólk í salinum flenna eftir teimum kvøld eftir kvøld.

Tað var eitt sindur av hesum yvir Finn Nørbygaard, tá ið hann var í Klaksvík og vitjaði farna vikuskiftið. Skemtiligi jydin var fyrikomandi og prátingarsamur, men tær somu søgurnar gingu aftur, tá ið hann tosaði við fjølmiðlafólk.

Hann hevði eftir øllum at døma funnið eina stuttliga søgu at siga, sum hevði tilknýti til Føroyar, og nú hann situr har við borðið og ikki sær so elegantur og strokin út, sum vit kenna hann frá tí framúrskarandi Finn'sk Fjernsyn, greiðir hann frá, hvussu tað var, tá ið hann var í Føroyum fyrstu ferð.

— Tað var tíðliga í 80'unum, at eg var boðsendur at koma til Føroya at undirhalda. Eg skuldi undirhalda børnunum í SMS í tríggjar dag. Hetta var fyrsta framførslan hjá mær nakrantíð, men tað er ivaleyst eingin, sum minnist til tað, tí har var eingin og hugdi, greiðir hann frá. Hárið tykist verða eitt vet ov langt, og klædnabúnan er óhátíðarligur, men tað eru nakrir tímar, til hann skal á pallin í KÍ-høllini.

### Fekk sekkin

— Eg skuldi hava tvær framførslur um dagin. Tá eg fór á pallin klokkan tvey, var eingin har, sigur hann og skapar eitt trillrunt 0 við fingrunum.

— Men teir skuldu ikki hava tað at siga. Eg læt sum einki og gjøgnumførdi tað, sum eg hevði ætlað mær.

Men tá ið seinna framførslan skuldi vera hendan dagin, var danski skemtarin tikin av plakatini, og ístaðin var ein kapping um ein túsundkrónuseðil, har tað ráddi um at eta so nógvar fløtabollar sum gjørligt.

— Eg spurdi teir so, hvussu var við mær, men teir søgdu bara, at eg gjørdi, sum eg vildi. Eg kundi fara heimaftur, ella eg kundi verða verandi í Føroyum í tríggjar dagar. Pengarnar, sum eg skuldi hava, skuldi eg nokk fáa.

Endin var, at Nørbygaard fór heimaftur sum av torvheiðum, og hann hevur ikki verið aftur í Føroyum fyrr enn nú.

— Soleiðis var mín byrjan sum skemtari á altjóða leikpallinum. Og fyri at hetta ikki skuldi endurtaka seg, havi eg biðið Norðoya Sparikassa tryggjað, at fólkini verða sitandi, tá ið eg skal á pallin, sigur hann og sipar til orsøkina til, at hann var í Føroyum. Hann undirhelt á ábyrgdarafundinum hjá sparikassanum í Norðoyggjum seinasta fríggjakvøld.

### Væl umtóktur

Finn Nørbygaard varð føddur í Esbjerg í 1952, og hann hevur hildið fast um jútsku røtur sínar, tí hann hevur í nógv ár verið búsitandi í Århus.

Í 1988 kom fyrsti filmurin við tí nógv umrødda Jydekompagniet, har Nørbygaard enn einaferð spældi klovn saman við makkara sínum Jacob Haugaard. Teir báðir slóu ígjøgnum við eini útvarpssending av fyrstan tíð, og teirra samstarv var bæði drúgt og gevandi.

– Eg havi arbeitt saman við nógvum dugnaligum fólkum, men tað var nakað serligt við Jacob Haugaard. Okkara samstarv var nakað fyri seg, og tað er helst nakað, sum tú bara upplivir eina ferð í lívinum, sigur Finn Nørbygaard.

### Finn'sk Fjernsyn

Føroyingar kenna hann helst best sum vertin og sjónleikaran í Finn´sk Fjernsyn, sum Sjónvarp Føroya hevur sent seinastu tvey árini.

– Tað er ótrúliga spennandi, men eisini krevjandi at gera hesa sendirøðina. Arbeiðið krevur sera nógv av tær, og hóast eg eri beskeðin, eri eg sannførdur um, at tað eru fáir skemtarar í Danmark, sum høvdu klárað hesa uppgávuna.

Eitt er, at tað tekur ein mánað at taka allar sketjurnar upp, men síðani er stóra uppgávan at vera vertur frammanfyri sjónvarpstólini, har tikið verður upp dag um dag, og alt skal fylgja eini neyvari ætlan.

– Eg skal bæði hugsa um fólkini í salinum, men alíkavæl snýr tað seg fyrst og fremst um upptøkutólini. Alt tað, sum eg skal siga, skal fylgja gongdini hjá upptøkutólunum, og einki kann kiksa, tí um tú mást taka nakað umaftur, so merkist tað á áhoyrarunum, sigur Finn Nørbygaard.

– Tí er tað eitt satt spæl at fara á pallin til eitt slíkt tiltak sum her í Klaksvík. Her kann eg vera púra fríur og gera tað, sum eg havi hug til, sigur hann.

Og tað gjørdi skemtiligi danin, sum undirhelt eini 1000 fólkum í 40 minuttir, og tað stóð ikki á. Har var nógv at flenna eftir.





*Niels Uni og hinir í MC Hár dugdu at undirhalda sær, hóast teir ikki komu langt í kappingini*



*Heðin Arge ger seg til reiðar til næsta dystin hjá útvarpsliðnum, har eisini Jákup Magnussen var við*



*Kim Hansen spælir harmoniku, og lagið er gott*



*James Olsen royndi seg sum málmann*

# Tónleikarar í stórformi

Tá ið fótbóltsevnini ikki rukku til, var nógv annað at undirhalda sær við. Eini 100 tónleikarar dystaðust farna vikuskiftið í eini innandura fótbóltskapping, og tað gjørdist ein øðrvísi kapping

TÓNBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*



*Vinnandi liðið var úr Fuglafirði*

Tónleikarar kenna seg helst best á pallinum ella í upptøkuhølunum, men farna vikuskiftið vóru tað eini hundrað av teimum, sum bjóðaðu av á vøllinum.

Høvið var innandurakapping í fótbólti á Kambsdali, og her vóru 20 lið við í kappingini. Talan var fyrst og fremst um tónleikarar, men eisini onnur, sum hava tilknýti til tónleikaheimin, spældu við.

Tað var ferð á allan leygardagin, og har var nógv at fáa við. James Olsen passaði málið, tá ið Bumba rímar við Sumba spældi, og hann var ikki lættur at sleppa framvið. Einu ferðina, tá ið mótstøðumaður kom leysur, stemmaði hann í at syngja Beatles-sangin: »Help, I need somebody«.

Tónleikararnir í MC Hár eru kendir fyri at hava eitt gott show, og soleiðis var eisini á vøllinum. Hóast teir ikki taldust millum sterkastu liðini, so var tað ikki keðiligt at hyggja eftir teimum.

— Ongantíð hevur eitt lið spælt so illa so leingi, helt Niels Uni Dam fyri eftir kappingina.

### Gott undirhald

Tað vóru nógvar góðar detaljur at fáa eyga á, men tað vóru eisini onkrir kiksarar, sum eisini síggjast, tá ið heimsins bestu bóltsspælarar bólta sær. Stjórin á Platform hevði ein ordans avbrennara, tá ið hann var ein metur úr málinum, og so mundi hann ikki komið fyri seg aftur, sum hann flenti eftir sær sjálvum.

Petur Pólsson var í rætta essinum, og tað frættist, at hann er ikki sæddur so góður síðani piltadeildina, tá ið hann var stórskjútti á GÍ-liðnum.

Hóast nógvir av spælarunum ikki vóru í besta kropsliga forminum til eina harða fótbóltskapping, so spældi alt væl av. Bara bassspælarin í Moirae, Mikkjal Joensen, var so óheppin at koykja sær fótin.

### Fuglfirðingar vunnu

Endin av kappingini var, at fuglfirðingar vunnu grótharða dystin um gullið. Liðið, sum var mannað við tónleikarum úr Atlas og onkrum sangarum úr manskórinum í Fuglafirði, vunnu finaluna ímóti liðnum hjá Grót.

Á liðnum úr Fuglafirði spældu menn sum Njál Reinert-Petersen, Mouritz Mohr og Kristian Petersen. Onkur vildi vera við, at hetta var fyrstu ferð, at fulgfirðingar høvdu vunnið nakað av týdningi, síðani einasta FM-heitið hjá teimum í fótbólti, ið teir vunnu í 1977. Og tá var Kristian Petersen eisini ein av spælarunum.

Eftir kappingina helt hann skemtiliga fyri, at hann merkti, at hann var ikki 40 longur.

All That Rain tryggjaði sær bronsuna í dysti ímóti Ataja, men fyrst og fremst snúði tað seg um at hava tað hugnaligt, og tað eydnaðist til fulnar. Eisini tí, at Kim Hansen og Magnus Johannesen upp á skift spældu harmoniku í høllini.

Hetta var fyrsta ferðin, at slíka fótbóltskapping varð hildin, men tað er neyvan seinastu ferð.